# vera ein uppliving




*Nýggja kundamóttøkan hjá Auto Service. Samstundis sum starvsfólkini sita við teldurnar og arbeiða, eru tey eisini til reiðar at avgreiða kundar. Fremst vinstrumegin situr Tummas Pauli av Reyni, kundamóttakari, aftanfyri hann sita Alex Jacobsen, lærlingur á eykalutagoymsluni, og Anthonius Dalsgaard, tekniskur leiðari. Høgrumegin sita Jan Hentze, goymsluleiðari og Tórur Bærentsen, verkførari. Við diskin standa Margit B. Nielsen, skrivstovulærlingur, Árni Rasmussen stjóri, Beinta Hammer, skrivstovufólk og Pól Jákup Poulsen, fíggjarleiðari. Aftan fyri tey sæst Erling Olsson, húsavørður*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Millum kundamóttøkuna og framsýningarhøllina er ein stór trappa, sum sameinir allar funktiónirnar, so tær kunnu virka sum ein eind.

Framsýningarhøllin er ein av teimum størstu av sínum slagi í landinum - stór og innbjóðandi, har fólk í friði og náðum kunnu ganga millum bilarnar av teimum ymisku bilmerkjunum og finna sær tann rætta bilin. Pláss er fyri 18 – 20 bilum í framsýningarhøllini. Fyritøkan umboðar fýra bilmerkir: Opel, Peugeot, Nissan og Saab. Í sambandi við útbyggingina er eisini ein nýggj høll gjørd til klárgering av nýggjum og brúktum bilum.

Við einum grundøki upp á yvir 9.000 fermetrar og einum bygningi upp á umleið 2.500 fermetrar er pláss fyri yvir hundrað bilum, so vit hava altíð eitt breitt úrval av nýggjum bilum á goymslu umframt teir brúktu, sigur Árni Rasmussen.

## Starvsfólkini altíð dagførd

Vit leggja stóran dent á, at øll starvsfólkini innan tær ymisku deildirnar altíð eru fakliga dagførd og hava ta nýggjastu vitanina og tey bestu amboðini at arbeiða við.

Vit hava t.d. samrøðu við hvørt einstakt av starvsfólkunum – fyri at vita hvat tey hava áhuga fyri og eru dugnalig til, so syrgja vit fyri, at tey fáa neyðugu útbúgvingina fyri at náa sínum máli til gagn fyri bæði seg sjálvi og fyritøkuna. Um fólk ikki trívast, gera tey ikki sítt besta, sigur Árni Rasmussen, sum hevur tilsamans 27 fólk í arbeiði.

Tað er soleiðis í dag, at bilarnir eru tekniskt so framkomnir, at um starvsfólkini ikki hava ta vitan og útbúgving, sum er neyðug, ber als ikki til at dríva slíkt virksemi á forsvarligan hátt, hvørki fyri kundan ella fyritøkuna. Tað at starvsfólkini altíð eru dagførd, og at tey vita, hvar tey finna teir røttu upplýsingarnar fyri at loysa ta ávísu uppgávuna, ger at uppgávan verður loyst skjótt og væl, sigur Árni Rasmussen, sum leggur afturat, at tá alt er endaliga liðugt við umbyggingini, verður skipað fyri stórari móttøka, har øll fáa møguleika at síggja fyritøkuna og hvussu vit arbeiða.